## DAGSINS MEINING

# Fólkaflokkurin mist alt trúvirðið

Fólkaflokkurin hevur aftur avdúkað, at tað er ikki tað allar minsta av trúvirði skapt í honum. Somuleiðis vísir flokkurin einaferð afturat, at hann heldur Føroya fólk fyri gjøldur, tá hann talar um at lækka skatt og kostnaðarstigið annars.

Nú hevur fíggjarnevndin viðgjørt uppskotið hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum, um at lata rentudráttin fyri sethúsalán verða uppi á 48 prosentum. Álitið vísir, at eingin av samgonguflokkunum tekur undir við uppskotinum.

Sostatt verður rentufrádrátturin ikki 48 prosent, men afturímóti 44 prosent. Eftir lógini um rentustuðul, skal rentustuðulin lækka niður í 44 prosent 1. januar í ár og næsta ár niður í 40 prosent.

Tá uppskotið var til 1. viðgerð, tóku allir samgonguflokkarnir uttan Sjálvstyrisflokkurin undir við uppskotinum. Serliga talaði Fólkaflokkurin heitt fyri uppskotinum.

Formaður Fólkafloksins á Løgtingi vant seg enntá upp í tær stóru oratorisku hæddirnar og næstan skuldsetti Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, tí hann ikki var komin við einum slíkum uppskoti.

Øll roknaðu tí við, at Fólkaflokkurin – og kanska eisini Tjóðveldisflokkurin – fór at atkvøða fyri uppskotinum. Men gakk. Eftir álitinum at døma, atkvøður Fólkaflokkurin ikki fyri hesum uppskoti, sum fyrst og fremst gagnar vanliga føroyinginum.

At Tjóðeldisflokkurin ikki tók undir við málinum, tá avtornaði, var ikki annað enn væntað. Hann meldaði kki greitt út, tá málið var til 1. viðgerð, og har afturat hevur gamli fiskimannaflokkurin vent sínum gamla sosiala og humana politikki bakið.

Hesuferð var annars væntandi, at Fólkaflokkurin fór at at taka undir við einum andstøðuuppskoti, tí herfyri snýtti samgongan Fólkaflokkin, tá málið um skattalætta var fyri.

Vit minnast, at fyrst boðaði Fólkaflokkurin frá einum uppskoti um skattalætta. Uppskotið hjá flokkinum skuldi leggjast fram, um fíggjarmálaráðharrin ikki kom við einum uppskoti áðrenn ein ávísan dag.

Hvørgin kom við uppskoti, og tískil løgdu Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin eitt uppskot fram, sum Fólkaflokkurin segði seg kunna taka undir við. Men tá avtornaði, atkvøddi hann ikki fyri.

Síðani kom eitt neðaregg frá Karsten Hansen, sum lættir skattin við 200 krónum um mánaði hjá teimum lægstløntu. Tað er gott, men tað munar ov lítið. Hesar 200 krónurnar eru longu mistar, nú rentustuðulin lækkar.

Tað merkir í veruleikanum, at landsstýrið gevur við vinstru hond og tekur við høgru. Borgarligur sosialpolitikkur, tá hann er av tí besta. Harafturat skulu vit minnast til, at Fólkaflokkurin heldur ikki atkvøddi fyri uppskotinum at lækka avgjaldið á bensinið!

Eitt er, at Fólkaflokkurin heldur Føroya fólk fyri gjøldur. Eitt annað er, at flokkurin má hava eina ónatúrliga lítla sjálvsvirðing, tá hann ferð eftir ferð rópar hart, og boðar frá skattalætta og avgjaldslætta, samstundis sum hann atkvøður ímóti.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Margretha S. Sigurðsson farin



Mánadagin bórust deyðsboðini av Margrethu S. Sigurðsson í Klaksvík. Hon var ættað av Eiði, dóttir Hans Jacob Poulsen, fyrsta tingmann Javnaðarfloksins í Eysturoynni og Thominu. Hann varð valdur á ting í 1936, men doyði ungur, 43 ára gamal, í 1937.

Margretha giftist Sigurði Sigurðsson úr Klaksvík í 1939 – og giftust tey inn hjá verforeldrunum, Jóin á Húsum og Annefíu, á Bakkanum í Klaksvík.

Margretha og Sigurð fingu átta børn, sjey synir og eina dóttir, Tórbjørg, sum býr í Svøríki. Sonurin Hans Jacob býr í Danmark, Jóin, Alfons og Tórleif búgva í Klaksvík, Jón Tórur býr í Saltangará, og Terji og Hallstein búgva í Havn.

Eins og móðirin á Eiði gjørdist Margretha ung einkja. Sigurð doyði longu í 1960 einans 45 ára gamal. Tá var elsti sonurin, Jóin, 20 ára gamal, meðan tann yngsti, Hallstein, júst varð fyltur 1 ár.

Tað var sjálvsagt tungt hjá henni at sita eftir einsamøll við barnaflokkinum, so har var einki annað at gera enn at fara út at arbeiða.

Hon fór fyrst á Pylsuvirkið hjá Hans Jacob Joensen, sum var ættaður úr Kollafirði og sum doyði í flogvanlukkuni í Mykinesi í 1970. Hetta pylsuvirkið var norðan fyri hermetikkvirkið hjá Kjølbro. Seinni fór Margretha á Kósina at arbeiða.

Fólk í Klaksvík, sum kendu Margrethu, hava virt hana nógv fyri dirvið, hon sýndi, tá hon sat einsamøll eftir við øllum børnunum, og børn hennara eru eisini samd um, at tey hava havt ein góðan og tryggan barndóm, hóast stóra missin.

Tá Margretha var komin har til, at hon kundi njóta aldurdómin, gjørdist hon sjúk, tá hon fyri níggju árum síðani fekk eina heilabløðing. Hon gjørdist lutvíst lamin, fekk ikki tosað, tó at hon kundi ganga. Hon hevur hesi árini verið á Norðoya Ellis- og Røktarheimi í Klaksvík.

Børnini vóru øll um hana, nú hon legði árarnar inn.

Seinasta fríggjadag gjørdist hon sjúk, og hon doyði mánadagin. Hon varð borin úr Christianskirkjuni í gjár.

# Spyrjið serfrøðingarnar

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**



*Bergur Hanusson, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Tordur verður sitandi

**Landsstýrið hevur víst kæruni frá borgara á Eiði um óreglusemið á kommunuvalinum, frá sær. Tað ber í sær, at Tordur Niclasen verður verðandi borgarstjóri valskeiðið út**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*



*Tordur Niclasen verður sitandi í borgarstjórasessinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Bygdarráðið á Eiði, sum valt varð tann 21 november í fjør, verður sitandi. Landsstýrið hevur víst kæruni um valið aftur.

Á kommunuvalinum tann 21. november í fjør, vóru tveir listar á Eiði. Listi A fekk tá fimm bygdarráðslimir valdar, meðan listi B fekk tveir.

Men tann seinni limurin hjá lista B var sera tepur. Bert ein atkvøða kundi gjørt, at hann ikki varð valdur, men at tann sætti limurin í staðin varð valdur á lista A. Tað hevði hent, um fínteljingin flutti eina atkvøðu av lista B yvir á lista A.

Tað gjørdi fínteljingin á Eiði, sum hildin varð eina viku eftir valið, ikki. Hinvegin hendi tað, at ein atkvøða var meira í atkvøðukassanum tá fíntalt varð, enn tað sambært valnevndini var, tá sjálvt kommunuvalið endaði tann 21. november.

Tá fíntalt varð, gjørdist úrslitið, at listi A hevði fingið eina atkvøðu meira, enn hann hevði sjálvt valkvøldið, meðan listi B hevði sama atkvøðutal.

Hóast listi A nú hevði fingið eina atkvøðu aftrat, gjørdi hon tó ikki, at sætti limurin á listanum av sær sjálvum varð valdur, tí listi B hevði framvegis sínar, sum tryggjaðu tann seinna bygdarráðslimin.

Hinvegin stóðst so mikið av iva um valið, at ein borgari á Eiði kærdi úrslitið til bygdarráðið. Bygdarráðið viðgjørdi kæruna, men vísti henni frá sær.

Tað var kærarin ikki nøgdur við, og sendi kæruna víðari til kommunala eftirlitið hjá landsstýrinum. Nú seinna kæran varð send, var ein undirskrift komin aftrat undir kæruna.

Kommunala eftirlitið hevur síðan viðgjørt kæruna, og í gjár kom so úrskurðurin, sum segði, at landsstýrið ikki metir grundarlag vera fyri at broyta úrslitið av valinum. Sostatt verður bygdarráðið, sum valt varð tann 21. november 2000, sitandi valskeiðið út.

Meðan málið um kæruna hevur verið viðgjørt, hevur bygdarráðið á Eiði skipað seg. Tá hendi tað, ivaleyst óvæntaða, at listi B, sum fekk tveir av sjey bygdarráðslimum, fekk borgarstjóran. Tað er Tordur Niclasen, sum fekk næstflestar atkvøður yvirhøvur á valinum á Eiði.


